## Fólkafundur

Valfelagið hjá Fólkaflokkinum í Sandoyar sýslu skipar fyri fólkafundi í Samljóð í Skopun á hvítusunnu. Á fundinum, sum verður 2. hvítusunnudag klokkan 15, verður høvi at hoyra Jákup Reinter Hansen, sóknarprest, Jacob Vestergaard, landsstýrismann, Óla Breckmann, løgtingsmann og Jákup Veyhe. Umframt røður verður sungið úr Songbók Føroya Fólks. Er veðrið til vildar, verður fólkafundurin á heygnum við Samljóð.

## Rimmar íløga

Amerikanska fyritøkan Alcoa og grønlendska heimastýrið samdust í gjár um eina avtalu, sum ber í sær, at Alcoa er til reiðar at gera íløgur fyri 15 mia. krónur í Grønlandi fram til 2014. Amerikanska fyritøkan er til reiðar at brúka 8,5 mia. krónur til at byggja eitt aluminiumsvirki í Grønlandi. Eitt tílíkt virki krevur ovurhonds nógva elorku, og Alcoa er sinnað at byggja vatnorkuverk, sum eru mett ar kosta 6,5 mia. krónur.

# en missir skipið




*Ringvirkningarnir av Nærabergi og seinni Atlantic Navigator hava verið stórir. Øll hava roynt sítt besta - í maskinrúminum, lastini, dekkinum, brúnni og heima á skrivstovuna í Klaksvík*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Royndu sítt besta

Eingin kann lastast fyri nakað. Øll hava roynt sítt besta, heilt úr maskinrúminum, upp á dekkið, víðari upp á brúnna og heim á skrivstovuna í Klaksvík.

Og tó, so eru í løtuni eingi útlit til, at annað skip kemur í staðin fyri Atlantic Navigator og fer undir líknandi framleiðslu.

Øll eru kedd, men eingin er mentur at gera nakað, ei heldur felagið í Klaksvík, sum var føroyski parturin í hesum.

Atlantic Navigator verður í næstum umbygdur til veiði eftir krill í Suðurískhavinum.

Felagið, sum stendur aftanfyri norska partin, hevur royndarfiskað eftir krill á hesum leiðum við einum øðrum skipi.

### Endi

Nú norska fiskivinnuumsitingin skal skriva út fýra permanent loyvi við endan av hesum mánaðinum, samstundis sum royndarloyvini verða tikin aftur, væntar norska felagið at fáa í minsta lagi eitt av hesum loyvum og kanska bæði tvey.

Um einar 2-3 vikur kemur Atlantic Navigator væntandi aftur av túri, og tá ið skipið loysir næstu ferð í Ánunum, verður tað bara ein spurningur, um hetta verður seinastu ella næstseinastu ferð.



*Øll eru kedd, men eingin er mentur at gera nakað, ei heldur felagið í Klaksvík, sum var føroyski parturin í hesum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Mánadagin landaðu Bakur og Stelkur sløk 500.000 pund í Saltangará. Skipini høvdu verið úti í fýra samdøgur, so hetta var rættiligur rokfiskiskapur*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Bakur og Stelkur hava rokfiskiskap

**Seinastu tveir túrarnar hava partrolararnir, Bakur og Stelkur, rættiliga havt rokfiskiskap. Royndin hevur verið fýra samdøgur hvønn túrin, og nú teir landaðu mánadagin, vóru teir meira enn fullir undir lúkurnar. Teir høvdu eisini stóra dekslast**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

240 tons – ella sløk 500.000 pund av upsa eftir roynd í fýra samdøgur.

Tað má sigast at vera rættiligur rokfiskiskapur.

Skipini landaðu mánadagin eftir at hava verið úti í fýra samdøgur.

Á Beta í Saltangará siga tey, at skipini umframt fulla last, eisini høvdu nógv kør av fiski á dekkinum.

Túrin undan hesum, høvdu skipini eisini nógvan fisk – og stutta roynd.

Tey royndu í sløk fýra samdøgur og landaðu stívliga 340.000 pund í Saltangará.

Hetta eru soleiðis tveir rættiliga góðir túrar.

### Góður fiskiskapur

Upsafiskiskapurin hevur tikið seg uppaftur, eftir at veiðan hevur verið sløk í mars og apríl.

Vanligt er, at veiðan minkar eftir gýting fyrr um várið, men tað eru menn, sum halda, at slaki fiskiskapurin helt sær longri í vár, enn vanligt er.

Men nú bendir so alt á, at rættilig gongd er komin á aftur, og at nógvur upsi er at fáa.

Hesa vikuna hava eisini onnur skip landað á landingarmiðstøðini hjá Beta í Saltangará.

Tveir trolarar, Brestir og Grímur Kamban, hava landað, og tað hava garnaskipini, Oknin og Vesturland, eisini.

Á Beta høvdu tey ikki neyvu tølini, tá ið vit frættu í morgun.

### Gulllaksur

Leygardagin og leygarkvøldið landaðu tey trý skip í Saltangará, sum eru á gulllaksaveiði.

Eysturbúgvin landaði leygardagin 260.000 pund, og leygarkvøldið landaðu Polarhav og Stjørnan heili 460.000 pund av gulllaksi.

Hetta er gulllaksavertíð, og á Tavuni í Leirvík hava tey úr at gera, tá ið skipini eru inni.